**UTTAN ÚR HEIMI**

# Greenspan lovar støðugari búskaparviðurskifti

**Búskaparfrøðingar siga, at fleiri positiv tekin vóru í røðuni hjá amerikanska tjóðbankaformanninum**

BÚSKAPUR
*Árni Joensen*

Fáur kann sum formaðurin í amerikanska tjóðbankanum ávirka hugsanir og metingar hjá fólki, ið hava samband við fíggjarheimin.

Tí sótu búskaparfrøðingar, bankafólk, íleggjarar og onnur við stórum spenningi og lurtaðu, tá Alan Greenspan helt røðu í amerikansku kongressini týsdagin. Aftan á røðuna var semja um, at innihaldið í røðuni boðaði frá góðum, bæði hvat viðvíkir amerikanska búskapinum og tí evropeiska.

Búskaparfrøðingar heftu seg serliga við tað, sum Greenspan segði um amerikansku rentuna. Í røðuni segði hann, at rentan nú er komin í sína lægstu legu, og at næstu ferð, rentan verður broytt, fer hon uppeftir. Hinvegin er greitt, at tað verður neyvan her og nú.

Evropeiskir búskaparfrøðingar siga, at nú Alan Greenspan hevur boðað frá, at amerikanska rentan ikki fer longur niður, fer tað uttan iva at hava við sær, at teir evropeisku tjóðbankarnir fara at varðveita verandi rentu.

Víst verður á, at evran er styrknað samanborið við amerikanska dollararan í seinastuni, og tað ger, at trýstið á rentuna í Evropa minkar. Tí er lítil og eingin vandi fyri, at rentan í Evropa hækkar.

Tær nógvu fíggjargølurnar og tey vánaligu úrslitini hjá nógvum stórum amerikanskum fyritøkum hava ørkymlað allan fíggjarheimin seinastu mánaðarnar, men sambært Alan Grenenspan fer vend at koma í amerikanska búskapin í næstum.

# Cheney seldi síni partabrøv og fekk væl burturúr

**Í sambandi við fíggjargølurnar í USA er George W. Bush, forseti lagdur undir at hava selt partabrøv við góðum vinningi, men varaforseti hansara, Dick Cheney, fekk væl meiri burturúr, tá hann seldi**

USA
*Árni Joensen*

Í august í 2000 fekk Dick Cheney 135 milliónir krónur í vinningi, tá hann seldi síni partabrøv í fyritøkuni Halliburton, har hann var ein av leiðarunum, til hann varð tilnevndur varaforsetaevni hjá George W. Bush upp undir forsetavalið sama heystið.

Tveir mánaðir eftir at Cheney hevði selt síni partabrøv, kunngjørdi Halliburton, at felagið hevði ikki havt so gott úrslit, sum tey flestu høvdu væntað, og alt fyri eitt fall virðið á partabrøvunum í fyritøkuni.

Hetta hevur reist spurningin, um Dick Cheney visti úrslitið hjá felagnum, tá hann seldi síni partabrøv.

Washington Post skrivar, at var varaforsetin vitandi um tað komandi úrslitið, tá hann seldi síni partabrøv, kann eingin ivi vera um, at talan er um lógarbrot. Enn hevur eingin skuldsett Cheney fyri at hava gjørt nakað ólógligt, men avdúkingin av søluni hevur fingið mong at ivast í, um hann er tann rætti maðurin til tað starv, sum hann nú hevur. Samstundis er komið fram, at Halliburton er í stórum fíggjarligum trupulleikum í dag orsakað av avgerðum, sum vórðu tiknar ta tíðina, Dick Cheney sat í leiðsluni.



*George W. Bush, forseti og Dick Cheney, varaforseti. Báðir eru undir illgruna fyri at hava fingið væl burturúr við at selja partabrøv í fyritøkum, sum teir leiddu, og sum seinni fingu trupulleikar. Spurningurin er, um teir vistu, hvønn veg tað bar*
*Mynd: Reuters*

# Oljufelag mátti lúta fyri illum kvinnum

**Í níggju dagar hava illar nigeriskar kvinnur hersett eina av teimum týdningarmestu oljuútflutningshavnunum í landinum.**

**Endin var, at oljufelagið slakaði**

NIGERIA
*Árni Joensen*

Tær 150 tilkomnu kvinnurnar tóku ein bát, stimaðu út til oljuhavnina og settu seg á flogvøllin og tyrlupallin.

Soleiðis sótu tær í níggju dagar og forðaðu oljuframleiðsluni, sum annars er um 450.000 tunnur um dagin. Kravið hjá kvinnunum var, at oljufelagið skuldi geva monnum teirra arbeiði, og at tær stóru oljuinntøkurnar skuldu koma tí lokala samfelagnum til góðar.

Chevron Taxaco, sum eigur oljuhavnina, tingaðist við kvinnurnar, og týsdagin kunngjørdi felagið, at tað hevði gjørt semju við kvinnurnar. Eftir semjuni skal Chevron Taxaco virka við til at útvega fólkinum har á leiðini vatn og elektrisitet, samstundis sum fleiri menn haðani skulu fáa arbeiði hjá felagnum.

Meginparturin av fólkinum í Nigera hava minni enn tíggju krónur at liva fyri um dagin, sjálvt um landið er sætta størsta oljuútflytaralandið í heiminum.



# Skoðsmálið skal broytast í komandi viku



*HenrikLarsen: Eftir at hava verið í Føroyum, vónar hann, at samstarvið við føroyskan fótbólt er komið uppá pláss.*

**Henrik Larsen, nýggi venjarin hjá fótbóltslandsliðnum, ætlar at síggja fleiri dystir og at tosa við nógv, sum hava við fótbóltin at gera, tá hann í komandi viku kemur fyrstu arbeiðsferðina henda vegin**

LANDSLIÐSVENJARIN
*Páll Holm Johannesen*

Í komandi viku kemur nýggi landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, á sína fyrstu arbeiðsferð til Føroya. Frá Fótbóltssambandinum sigur hann seg hava fingið at vita, at tað hevur verið funnist at honum, at hann ikki hevur víst seg í Føroyum, og at hann er komin upp á tvørs hjá fleiri, áðrenn hann fyrstu ferð hevur víst seg í Føroyum, síðani hann var her og undirskrivaði sáttmálan.

Tað sigur venjarin seg harmast um, og hann vónar, at skoðsmálið verður betri, tá hann fer úr aftur Føroyum.

Henrik Larsen heldur ikki at atfinningarnar hava verið rímuligar, og hann hevur framvegis avgjørdar áskoðanir:

– Eg ætli framvegis at liðið skal fáa sjey stig. Eg ætli framvegis, at liðið skal spæla 4–4–2, og eg rokni við, at tað verður neyðugt at gera útskiftingar á liðnum, er tað, sum venjarin hevur at siga.

Tað tykist vera eitt sindur betri grundarlag hjá Henrik Larsen at úttala seg um landsliðið, enn tað var, tá hann úttalaði seg fyrstu ferð. Nú sigur hann seg hava tosað við gamla venjaran, Allan Simonsen, og við hjálparvenjaran, Jógvan Martin Olsen.

– Tá tú kemur sum nýggjur venjari til eitt felag ella í hesum førinum til føroyska landsliðið, so er neyðugt, at tú hevur áskoðanir og ætlanir. Tað ræður støðugt um at menna liðið og at arbeiða við møguleikunum, sum eru. Mín hugburður er, at tað er best, at liðið spælir 4–4–2, og tað fara vit at arbeiða út frá. Veruleikin er, at onkrir spælarar eru farnir um bestu árini á landsliðnum, og at nýggir skulu spælast inn. Tað fara vit at kanna nærri næstu vikurnar. Á listanum, sum eg havi í løtuni, eru 32 nøvn. Eg rokni við, at tað fyrst og fremst verður ímillum hesar, at hópurin til vinardystin ímóti Liktinstein 21. august verður valdur, men nú fáa vit at síggja, sigur Henrik Larsen.

## Ætlanin

Henrik Larsen kemur til Føroya komandi mikudag, og hann fer at steðga her í eina viku. Mikukvøldið skal hann síggja B36 spæla heimadyst í Europa Cup kappingini, og ólavsøkudag fer hann at vera millum áskoðararnar, tá HB og NSÍ fara at spæla steypafinaluna.

Umframt hesar dystirnar fer venjarin at síggja tveir venjingardystir. Avrátt er, at HB og GÍ skulu spæla venjingardyst hóskvøldið, og at B68 og KÍ skulu spæla fríggjakvøldið. Tað verða neyvan nógvir áskoðarar til hesar dystirnar, men landsliðsvenjarin fer at hyggja.

– Umframt at síggja dystirnar, so vóni eg, at tað fer at bera til at heilsa upp á venjarar og spælarar. Kanska tað eisini í komandi viku verður møguleiki fyri at fylgja við í venjingini hjá onkrum felag, er ynskið hjá Henrik Larsen.

Í FSF roknaðu teir fyrr í summar við, at landsliðsvenjarin fór at vísa seg í Føroyum nógv fyrri, enn hann nú fer at gera. Hann var venjari í Ølstykke, tá hann varð settur í starv hjá FSF. Roknað varð við, at hann skuldi koma til Føroya, tá Ølstykke hevði tryggjað sær uppflyting. Tað gjørdu teir tíðliga í juni, men venjarin koim ikki til Føroya. Í hvussu so er varð roknað við, at venjarin fór at koma til Føroya, tá síðsta umfarið í landskappingini var á skránni 7. juli, men venjarin var heldur ikki í Føroyum tann dagin.

Nú sigur venjarin, at tað var í samráði við FSF, at hann ikki kom til Føroya:

– Eg var í summarfrí saman við familjuni eftir at sáttmálaskeiðið við Ølstykke var liðugt, sigur venjarin.

Á FSF hava vit skilt, at tað var ikki fyrrenn beint undan ferðini til Føroya, at venjarin bað um at fáa tíð til summarfrí. Tað setti FSF seg ikki ímóti.

## Altráðir týskarar

Tá prátið fellur inn á dystirnar í heyst, er tað synd at siga, at venjarin er dapurskygdur:

- Skotarnir hava ikki somu styrki, sum teir hava havt í undanfarnu kappingunum. Føroyar hava áður staðið seg ógvuliga væl ímóti teimum. Tí haldi eg, at vit hava orsøk at vera bjartskygdir undan heimadystinum ímóti teimum. Føroyar hava áður megnað málleysan javnleik á útivølli ímóti Litava. Tað boðar frá, at dysturin ímóti teimum er opin. At spæla í Hannover 16. oktober verður sjálvandi nakað heilt serstakt fyri okkum allar. Tað er ikki á hvørjum degi, at tú hittir varaheimsmeistararnar, heldur venjarin.

Hesar seinastu vikurnar hevur telefonin aftur og aftur kimað. Tað eru týskir tíðindamenn, sum fregnast:

– Teir spyrja um Føroyar, landsliðið, hvørjir spælarar eru á liðnum og alt annað, sum á nakran hátt kann hava við føroyska landsliðið og dystin í heyst at gera, sigur Henrik Larsen.

Mikudagin kemur hann til Føroya. Eftir ólavsøku fæst at síggja, um skulu vit kalla tað klossuta byrjanin upp á samstarvið við føroyska fótbóltin er vaskað burtur.